# Umboðsráðsval 2016
# til
# Ognarfelag Tryggingartakaranna



## Johan Petersen

## Avrik og ætlanir

***Um Ognarfelag Tryggingartakaranna:***

Ognarfelag Tryggingartakaranna eigur gjøgnum TF Holding øll feløgini í TF Samtakinum, eisini Eik Banka.

Allir tryggingartakarar í Tryggingarfelagnum Føroyar eru limir í Ognarfelag Tryggingartakaranna.

Umboðsráðið umboðar limirnar og hevur avgerðarrættin á aðalfundunum. 35 fólk sita í Umboðsráðnum. Av hesum standa 18 fyri vali.

Valið verður í februar 2016 og allir limir fáa atkvøðuseðil tilsendandi.

***Ætlanir:***

Undirritaði hevur verið í Umboðsráðnum seinastu 4 árini og standi fyri vali.

Verði eg afturvaldur ætli eg mær m.a. at leggja dent á, at:

- avtaka rættin hjá nevndini at seta hámark á støddina av vinningsbýti til limirnar – hetta skal aðalfundurin áseta
- avtaka rættin hjá nevndini at velja fundarstjóra - hetta skal aðalfundurin gera
- forða fyri, at søgan um Eik Banka kann endurtaka seg

Havi sjálvur sent uppskot inn um tvey av omanfyristandandi átøkum. Uppskotini koma til viðgerðar á aðalfundinum í apríl.

***Heldur tú, at hetta er rætt, kanst tú atkvøða fyri Johan Petersen***

***Avrik:***

Havi farnu 4 árini avrikað/havt avgerandi ávirkan á:

- ✓ sjálvur kravt og fingið nevndina at leggja fullfíggjaðan roknskap fyri aðalfundin – í staðin fyri sum áðrenn 2 tøl á skíggjan á vegginum: 1 stk. yvirskot (t.d. 250 mió. kr) og 1 stk. eginogn (t.d. 2,0 mia. kr)
- ✓ saman við tveimum øðrum lagt uppskot fram og fingið samtykt, at allir tryggingartakarar fáa tilsendan atkvøðuseðil
- ✓ sjálvur lagt uppskot fram um at strika tekningarfreistina upp á 5 dagar fyri at luttaka á aðalfundi – hetta bleiv tó broytt til 2 dagar
- ✓ sjálvur lagt uppskot fram 2 ferðir um at strika ásetingina um, at nevndin velur fundarstjóra – hetta skal aðalfundurin gera, soleiðis, at tað ikki er nevndin, men umboðini hjá tryggingartakarunum, sum stýra fundinum. Uppskotið fallið báðu ferð.
- ✓ sjálvur lagt uppskot fram 2 ferðir um at strika ásetingina um, at avlop skal flytast til næsta ár. Ístaðin skal aðalfundurin avgera hetta. Uppskotið fallið báðu ferðir, men nevndin gjørdi knappliga uppskotið til sítt, og tá bleiv tað viðtikið – tó við tí avmarking, at nevndin setur hámark á upphæddini fyri útlutan av vinningsbýti

***Tá ið eg sjálvur skal siga tað, haldi eg meg hava gjørt mun. Heldur tú, at omanfyristandandi er vert tína atkvøðu, kanst tú atkvøða fyri***

***Johan Petersen***

***Eginogn:***

Havi frá fyrsta degi sum umboðsráðslimur sett fokus á skeivleikan í, at eitt "sínámillum" tryggingarfelag savnar upp formúu og so keypir ein banka fyri hesa formúu. Hetta er ikki endamálið við hugtakinum "sínámilllum". Men eg kundi ikki fáa yvirlit yvir eginognina og mátti tí sjálvur gera tað. Stabbadiagrammið niðanfyri vísir við allari týðuligheit skeivleika í hesi framferð.




Eginogn 1940-2014. Havi ikki kunnað fingið tølini fyri 1990-95

***Heldur tú, at hetta er vert tína atkvøðu, kanst tú atkvøða fyri Johan Petersen***